

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Neistin skal aftur í eldin

**HONDBÓLTUR** Neistakvinnurnar fáa seg av álvara royndar um vikuskiftið, tá tær vitja í Runavík. Tað verður fyrsti dysturin hjá Tjaldrinum við Trygva Mortensen sum venjara

Uni Holm Johannesen

Neistin hevur vunnið á Tjaldrinum og Stjørnuni á heimavølli.

Nú skulu blálittu kvinnurnar úr høvuðsstaðnum royna seg á útivølli móti Tjaldrinum.

Trygvi Mortensen er nýggjur í venjarastarvinum í Runavík. Hann skal nú standa á odda fyri Tjaldrinum fyri fyrstu ferð.

Eitt venjaraskifti plagar at gera mun, og spurningurin er, um kvinnurnarn í TJaldri ikki fáa lyft sítt støði longri upp enn tað hevur verið seinastu dystirnar.

Dysturin verður torførur hjá Neistanum, sum hevur møguleikan at staðfesta, at tær standa einki aftan fyri Stjørnuna, sum er oddalið.

## VB í Klaksvík

Stjørnan kann – og er favorittur – at reisa seg aftur sunnudagin.

Greipuvinnararnir taptu á Neistanum týskvøldið, og nú VB vitjar er kravið heilt einfalt tvey stig.

Svein Rógvi Nielsen, venjari, segði í sjónvarpinum í gjár, at tapið fyri Neistanum var eitt spark í afturpartin og ein ávaring, at hini liðini ætla sær at koppa klaksvíkskvinnunum.

Kyndil og VÍF spæla í høllini á Hálsi sunnudagin.

uni@sosialurin.fo

# H71 skal standa sína roynd

**HONDBÓLTUR** Í morgin vitjar Neistin í Hoyvíkshøllini. H71 er nummar trý undan dystinum

Uni Holm Johannesen

Aftaná eina keðiliga byrjan við tveimum ósigrum upp í slag, hevur H71 spakuliga otað seg nærri oddinum. Nú eru hoyvíkingar nummar trý.

Í morgin vitjar Neistin í Hoyvík. Tað verður sanniliga ein styrkiroynd hjá hoyvíkingum, sum við einum sigri kunnu fáa spenning í aftur kappingina millum ovastu liðini, ið Neistin og KÍF hava verið á seinastu vikurnarn.

## Team Klaksvík aftur

Team Klaksvík fær vitjan av kollfirðingum í morgin.

Klaksvíkingar hava tapt stórt og sannførandi í øllum landskappingardystunum higartil, og tað er millum lítið og einki sum bendir á, at teir brádliga fær at stjala stig frá KÍF.

Sunnudagin spæla Kyndil og VÍF í Havn.

uni@sosialurin.fo

# Nú skal føroya-meistarin finnast



*Savnsmynd*

**FJALLASÚKKLING** Leygardagin verður fjallasúkkling á skránni. Hetta er 5. og seinasta umfar í ár av fjallasúkklukappingini H&G Cup 2010

Tíðindaskriv

Tað verður kappast á økinum kring Føroya Studentaskúla í Hoydølum.

Hesa ferð verður kappast í FM í greinini MTB Criterium, sum er ein fjallasúkklukapping, har koyrt verður á einum lítlum øki í tildømis ein tíma, pluss eitt umfar.

Í samlaðu støðuni hjá teimum vaksnu er Gunnar Dahl-Olsen á odda við 22 stigum. Í hølunum á honum eru Andrass Joensen og Torkil Veyhe. Tað eru bara fýra stig, sum skilja nummar eitt og nummar tvey.

Torkil Veyhe hevur vunnið eina kapping, og Gunnar Dahl-Olsen hevur vunnið tríggjar. Andrass Joensen hevur verið við í oddinum og vunnið silvur og bronsu higartil.

Torkil Veyhe, sum flutti til Danmarkar aftaná summarsteðginum, er í Føroyum í hesum døgum, og hann verður væntandi við leygardagin. Ein av sterkastu súkklarunum í Føroyum, Guðmundur Joensen, hevur eisini ætlanir at royna seg innan MTB, og tað verður væntandi eisini við leygardagin.

## ÍTRÓTTURIN UM VIKUSKIFTIÐ:

**Leygardagin, 20. november:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | KÍF – ÍF | Kollafjørður | 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | Ternan – Dráttur | Toftir | 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Team Klaksvík – KÍF | Klaksvík | 17.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | H71 – Neistin | Hoyvík | 18.00 | Menn |

**Sunnudagin, 21. november:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | TB – Fleyr | Trongisvágur | 13.45 | Menn |
| FIMLEIKUR | FM í amboðsfimleiki | Tórshavn | 14.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Kyndil – VÍF | Tórshavn | 14.30 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | Mjølnir – SÍ | Klaksvík | 14.30 | Menn |
| FLOGBÓLTUR | TB – Fleyr | Trongisvágur | 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Stjørnan – VB | Klaksvík | 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Tjaldur – Neistin | Runavík | 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Kyndil – VÍF | Tórshavn | 16.00 | Menn |
| FLOGBÓLTUR | Mjølnir – SÍ | Klaksvík | 16.30 | Kvinnur |